# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Citroën C4 Picasso:

# Rúmligur 7 persóna-bilur




*Citroën C4 Picasso. Bilurin er sermerktur av óvanliga stóra forrútinum, sum gongur langt inn á takið*

**Ein heilt nýggjur Citroën C4 Picasso er komin á marknaðin. Talan er um ein familjubil við sitiplássum upp til 7 ferðandi. C4 Picasso er eitt meistaraverk í rúmligheit og liðiligari og praktiskari innrætting**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Citroën eru komnir á marknaðin við einum heilt nýggjum bili, C4 Picasso, sum er ein stórur, rúmligur og praktiskur 7 persónabilur við sera liðiligari innrætting.

Hóast Citroën C4 Picasso eitur Picasso til eftirnavn, er hann ikki avloysari fyri 5 persónabilin Xsara Picasso, sum verður á marknaðinum í nøkur ár afturat. C4 Picasso er bygdur yvir sama plattform sum Citroën C4, men er í støðd millum Xsara Picasso og Citroën C8, sum er ein størri 7 persóna bilur.

Designið er smart í røttum Citroën stíli. Bilurin er sermerktur av óvanliga stóra forrútinum sum gongur langt inn á takið, smala A-stólpanum og stóra síðurútinum, sum gevur gott útsýni hjá bilføraranum. Nógvir MPV hava í seinastuni fingið kritikk fyri, at A-stólpin tekur so nógv av útsýninum, og at hættisligir blindvinklar eru ein trupulleiki. Citroën hava loyst hendan trupulleikan til UG.

Kølaragittarið er eins og á øllum nýggjum Citroën við innbygdum Citroën logo.

Instrumentini eru í miðjuni á instrumentborðinum. Girstongin situr uppi undir instrumentborðinum, og bilurin er lættur at koyra og at umgangast. Koyriegin-leikarnir eru, sum vit kunnu vænta av einum fronskum bili - stabilir og tryggir við komforti á høgum støði. Tað kennist sum at koyra ein munandi størri bil.

C4 Picasso fæst við tveimum bensin og tveimum dieselmotorum. Bensinmotorarnir eru: 1.8 litur við 127 hk og 2.0 litur við 143 hk. HDI turbodiesel motorarnir eru: 1.6 litur við 110 hk og 2.0 litur við 138 hk.

Bilurin er væl útgjørdur við øllum teimum nýggjastu trygdarskipanunum sum t.d. ESP, airbag framman, í síðunum, og gardin- og knæairbag. 3-punkt rulluselar á øllum plássum, o.m.a.

Tað er familjan hjá heimskenda listamanninum Pablo Picasso, sum hevur givið Citroën loyvi til at brúka navnið Picasso.

Bíligasti Citroën C4 Picasso kostar kr. 246.000,-. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum.

## FAKTA

**Citroën C4 Picasso**

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 1.6 litur turbodiesel 110 hk |
| **0-100 km/t** | 12,7 sek |
| **Oljunýtsla** | 17,0 km/l |
| **Dekkstødd** | 215/55-16 |
| **Støðd og vekt** | |
| **Longd** | 459,0 cm |
| **Breidd** | 183,0 cm |
| **Hædd** | 168,0 cm |
| **Vekt** | 1.551 kg |
| **Viðførisrúm** | 208 litrar (v. 7 setrum) |
| **Prísur** | Kr. 264.000,- |
| **Søluumboð** | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |




*C4 Picasso, sum er ein stórur, rúmligur og praktiskur 7 persónabilur við sera liðiligari innrætting*



*Instrumentini eru í miðjuni á instrument-borðinum, og girstongin situr í instrument-borðinum*